Lýsing

Sambært lóg frá 12. mars 1923 um kommunala skattalíkning í Føroyum verður einhvør, ið álíknast skal persónligan skatt ella vinnuskatt, og øll bókahaldsskyldug í Tórshavnar kommunu biðin um annaðhvørt sjálv ella við fulltrúa, tó um so er — við fulltrúargevarans egnu ábyrgd — at geva upp inntøku sína í árinum 1959 ávikavist **innan 15. og 31. januar 1960** samsvarandi teim sjálvuppgávuskjølum, sum nevndin útflýggjar skattgjaldarunum. Serliga verður víst á, at hann, sum í yrki sínum vanliga nýtir annað rakstrarár enn álmanakkaárið, hevur rætt til at nýta hetta í sjálvuppgávuni. Hesi útfyllingarbløð verða at endurflýggja **TÓRSHAVNAR LÍKNINGARNEVND.**

Tað verður beinleiðis gjørt kunnugt, at hann, sum ikki í rættari tíð gevur upp inntøku sína samsvarandi áðurnevndu lóg, missir rættin til at mótmæla skattaálíkning sína, um hann ikki kann vísa á, at skattalíkningin er meir enn 25 % hægri enn veruliga inntøka hansara. Er munurin meira enn 25 %, skal hann gjalda skatt av veruligu inntøku síni við 25 % í viðbót.

Hann, sum einki útfyllingarblað hevur fingið, eigur sjálvur at snúgva sær til **Tórshavnar Líkningarnevndar,** tá møgulig mistøk við útbýtanina onga ávirkan á undannevndu ásetingar hava.

Persónar, sum eru skyldugir at føra løggildar handilsbøkur, og skattskyldig deyðsbúgv **skulu saman við sjálvuppgávuni senda inn rakstrarroknskap og uppgerð yvir fíggjarstøðu við rakstrarársins byrjan og enda.**

Sjálvuppgávur, sum ikki eru innkomnar áðrenn undannevndu frestir í tí fyriskrivaða sniði og rætt undirritaðar, kunnu ikki verða kravdar tiknar til umhugsunnar.


Arbiðsgevarar verða bidnir um at geva frágreiðingar um goldnar lønir o. a. m. til arbeiðsfólk sítt, og mugu teir **innan 15. januar 1960** senda líkningarnevndini hesar frágreiðingar, sum teir eru skyldugir til smb. § 34 í áðurnevndu lóg. Um arbeiðsgevari ber seg undan, kunnu hesar frágreiðingar verða kravdar fram av yvirvaldinum við dagbót.

Somuleiðis verður kunngjørt, at hann, sum til skaða fyri kommununa miðvíst gevur skeiva sjálvuppgávu ella gevur líkningarnevndini skeivar upplýsingar um inntøku ella ognar- og førimunarviðurskifti síni, **verður sektaður við, at hann til kommununa bøtir upp til 10 ferðir tann skatt, hann hevur svikið.**

Øll verða biðin um at skriva nøvn og bústað (gøtunavn og húsanummar) skilliga á sjálvuppgávuna, so tey verðaikki misskild.

Húsaánarar fáa at vita **virði av bústaði í egnum húsum** við at venda sær til líkningarnevndarinnar, máltr. 1068.

TÓRSHAVNAR LÍKNINGARNEVND



PRENTSMIÐJAN Á HEYGSBREYT
TÓRSHAVN
AVRIKAR ALT PRENTINGARARBEIÐI
TELF. 1820

Havna vit í yvirklassa-samfelagnum?

Týski og bretski arbeiðaraflokkurin hava nýliga tikið støðu til henda spurning og leggja nú miklan dent á at vinna frama fyri økonomiska demokratinum.

Týski og bretski arbeiðaraflokkarnir hava havt landsfund, báðirí slíkari støðu, at teir við seinastu valini ikki vóru mentir at vinna á teimum stóru konservativu flokkunum í hesum londum.

Við teimum konservativu á stjórnarpallinum er ovurstórur vandi fyri, at hin kapitalistiski yvirklassin ger sær dælt og brýtur niður alt økonomiskt demokrati, so hin stóra fjøldin meira og meira kemur undir alt vald hjá nøkrum fáum peningamonnum — stórkapitalistunum.

Tað er hesum vanda, hesir flokkar nú hava sett sær sum mál at vinna á, og tí hevur verið neyðugt í vissum førum at leggja stevnuna og stríðsháttin á annan bógv uttan tó at víkja frá teimum nútímans sosialdemokratisku sjónarmiðunum.

Gaitskell, formaður bretska arbeiðaraflokksins, segði á landsfundinum, at dagligu livilíkindini og tey samfelagsligu viðurskiftini vóru broytt í stórum. Tað verður tí eitt høvuðsmál hjá arbeiðararørsluni undir teimum broyttu viðurskiftunum at leggja til rættis ein politikk, ið framvegis otar menningina fram móti betri livilíkindum, sum støðugt útbyggja vælferðarstatin, og sum ikki minst demokratiserar tað økonomiska lívið.

Tann ungdómurin, sum er vaksin upp undir hesum nýggju viðurskiftunum, hevur óivað ilt við at skilja, hvussu neyðugt tað er við samfelagsligum eftirliti við økonomiska lívinum, ið uttan slíkt eftirlit í størri og størri mun kemur undir alt vald hjá nøkrum fáum ríkmonnum.

Tí ræður um at tryggja hitt økonomiska demokratiið við samfelagsins yvirtøku av virkjum, tá tey eru av almennari nattúru, við samfelagsligum eftirliti og ávirkan eins og við, at arbeiðararnir fáa størri og størri ávirkan á dagligu leiðsluna í verksmiðjunum og øðrum stovnum.

Tá flokkarnir í Týsklandi og Bretlandi hava slakað í sjónarmiðunum viðvíkjandi privata ognarrættinum, er hetta einans gjørt fyri betur at kunna manna seg til stríð móti stórkapitalismuni, sum við hvønn einasta konservativan valsigur verður størri og sterkari og fær tryggari grundarlag at byggja sítt peningavaldi á.

Telegramtakster

Fra 1. januar 1960 er telegramtaksterne til Danmark og de fleste andre lande ændret, og der beregnes minimumstakst for 7 ord.

F. eks. bliver taksten til Danmark 39 øre pr. ord.

Yderligere oplysninger fås på telegrafstationen.

Thorshavn, d. 29. december 1959
C. Olsen.

Setið lýsing tygara

í

SOSIALIN

Mangt og hvat

STÓRPOLITISKT Ulbricht, flokksskrivari og Grotewohl, forsætisráðharri, í Eysturríki fóru í bil til eina samkomu. Á vegnum sigur Ulbricht:

— Um eg hevði tveitt sigarettpakkar út gjøgnum vindeygað, vildi eg havt annanhvønn mann upp á mína síðu.

Grotewohl:

Um eg hevði tveitt nylonsokkar út gjøgnum vindeygað, vildi eg havt aðruhvørja kvinnu upp á mína síðu.

Bilstjórin:

— Um eg hevði tveitt tykkum báðar út gjøgnum vindeygað, vildi eg havt alt fólkið upp á mína síðu.

★

— Er hann lukkuligur í hjúnarbandinum við kvinnuni, hann fekk við lýsing her í blaðnum?

— Eg veit ikki; hann hevur sagt blaðið frá sær.

★

Konan er rýmd frá grikska stórreiðaranum Onassis og vil einki hava við hann at gera meira; men hetta tykir hann heldur ikki at leggja stórvegis í. Við blaðmann sigur frú Onassis:

»Tað eru farin næstan 13 ár, síðan vit giftust. Onassis er síðan vorðin ein av heimsins ríkastu monnum; men hansara ríkidømi hevur ikki børið mær eydnu...... Eg vænti, hann heldur áfram við at njóta ta tilveru, hann sjálvur ynskir, men sum eg onga an sannan lut havi átt i.«

★

BARNAMATUR

Ein drongur vann í happadráttinum og ætlaði at keypa sær eina syklu, men ov lítið var vunnið. Tó so, um hann hevði havt ein triðing meir, enn hann vann, so tvørraði honum bert ein fimting av tí, hann skuldi lata fyri sykluna, og hon kostaði 200 kr.

Hvussu nógv vann hann í happadráttinum?

★

Sjúkrasystirin: Ja, tíverri fái eg ikki mannin hjá tygum at taka medisinið. Hvat skal eg gera?

Konan: Lat medisinið upp í eina akkvavitfløsku, so skulu tygum síggja ein kvikan mann.

veitst tú

AT kvikasta á í heiminum er Sutlej í India. Hon er 112 km long og hallið omaneftir 4000 m.

AT kønir menn hava roknað út, at ein menniskja í meðal sigur 4 milj. orð um árið.

AT í 5500 m hædd nýtast bert 82 hitastig fyri at fáa vatn at kóka.

AT fyllupennurin varð uppfunnin í 1780 av einum handverkara í Leipzig í Týsklandi.

AT Chinchilla er navnið á einum gnagdjóri í Suðurameriku við sera dýrum pelsi. Ein chinchillakápa kostar 600,000 krónur.

AT svenskir jarðfrøðingar eru komnir **arnir í tunguni vórðu tvinnaðir saman, kunnu teir lyfta 150 kg. Annars eru teir 13 km langir, um teir verða lagdir enda í enda.**

AT svenskir jarðfrøðinga reru komnir eftir, at skandinaviska eysturstrendin tek ur seg eina hálva cm upp úr sjónum á hvørjum ári.

AT í meðal er giftingaraldurin í Noreg 24,7 ár hjá kvinnum og 27,9 hjá monnum.

AT síðan seinasta kríggj eru 325.000 familjur í Noregi fluttar í nýggj hús.